## Royndur danskur trubadurur í Café Natúr

Danski sangarin og sangskrivarin David Skydsgaard fer frá í annað kvøld hóskvøldið og fram til og við sunnukvøldinum at undirhalda á Café Natúr.

Skydsgaard er royndur trubadurur og hevur altíð skriva og spælt løg. Hann hevur arbeitt innan nógvar ymiskar tónleikagreinar, m.a. harðan rokkónleik, akkustiskan fólkatónleik, blústónlei og sum einmannsbólkur í einum sirkusi. Seinastu 15 árini hevur hann liva av tónleikinum, sum einstaklingur og í ymiskum bólkum. Nú gongur leiðin til Føroyar, har Café Natúr leggur pall til hansara.

**nud**



# Teir stóru fóru við milliónini

**Atlantic Airways og Smyril Line fingu tað mesta av milliónini, sum Ferðaráð Føroya í fjør lat eftir krónu-til-krónu prinsippinum at marknaðarføra Føroyar uttanlands**

MARKNAÐARFØRING
*Gunnar Skúvadal*



*Saman við fløgførunum hjá Atlantic Airways fór Norrøna avstað við bróðurpartinum av milliónini, sum Ferðaráðið læt til marknaðarføring í fjør. Freistin fyri nýggjum umsóknum er í ár sett til 5. februar*

"Project Name Recognition" hjá Smyril Line. Og "Road Show" í Noregi hjá Atlantic Airways. Hetta vóru tvær av verkætlanunum, sum fingu stuðul frá Ferðaráðnum eftir krónu til krónu meginregluni í fjør. Tiltakið er aftur í ár, og Ferðaráðið hevur nýliga havt lýsingar í bløðunum, har tey, sum halda seg ganga undir treytirnar, kunnu søkja.

### Serliga týskarar

Verkætlanin hjá Smyril Line var serliga vend móti týskarum. Við at lýsa í lokalum bløðum, senda út faldarar, vitja ferðamessur sum serliga venda sær til týskarar og lýsa málrættað til týskar ferðamannastovur vildi Smyril Line økja um kunnleikan hjá týskarum og vekja teirra áhuga fyri at koma til Føroyar at ferðast. Tað sigur Unn á Lað, leiðari á Marknaðardeildini hjá Ferðaráðnum.

Smyril Line fekk eisini stuðul frá Ferðaráðnum til at lýsa uttanlands við altjóða fiskikappingini sum var í Runavík í fjør, Smyril Line International Sea Angling Cup.

### Atlantsflog tríggjar

Atlantic Airways vendi sær serliga til norskar ferðasmiðir í tiltakinum Road Show í Noregi, sum aðrir føroyskir ferðasmiðir eisini fingu møguleika at vera við í. Endamálið var at lýsa Føroyar sum ferðamannaland hjá norskum ferðasmiðum og eisini hjá norskum fjølmiðlum. Atlantsflog fekk eisini stuðul til tvær aðrar verkætlanir. Onnur var ein lýsingarherferð í Íslandi, sum skuldi fáa fleiri íslendingar at koma hendaveg í lágárstíðini. Hin var ein verkætlan sum saman við hetlendingum skuldi lata eyguni hjá bretum upp fyri møguleikanum at ferðast hendavegin. Tilsamans fingu Atlantic Airways og Smyril Line meir enn helvtina av millliónini, sum Ferðaráðið hevði sett av til endamálið.

### Smáu eisini við

Millum smærru virkini, sum fingu stuðul, var Green Gate Incoming, sum fekk stuðul til tað tey kalla eina MICE verkætlan. MICE er stytting fyri Meetings, Incentives, Conferences og Events. Endamálið var at marknaðarføra Føroyar sum eitt nýtt og áhugavert tilboð til málbólkin, sigur Unn á Lað.

Stuðul varð eisini latin til eitt Cruise samtak, har Tor Shipping, MB Tours, Skipafelagið, Green Gate Incoming og Tórshavnar Havn vóru við í. Endamálið var at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál hjá Cruise skipum, og soleiðis fáa fleiri at koma til Føroyar.

### Onkur fekk onki

Fleiri krøv verða sett verkætlanunum, sum søkja um stuðul til marknaðarføring frá Ferðaráðnum. Talan skal vera um serlig tiltøk, tað vil siga, at Ferðaráðið letur ikki stuðul til vanligu marknaðarføringina hjá fyritøkuni. Eisini skal ætlanin halda seg innanfyri eina kostnaðarrammu. Í ár er hon í minsta lagi 50.000 krónur og í mesta lagi 250.000 krónur.

Í fjør vóru nakrar verkætlanir, sum fingu noktandi svar um stuðul. Ein snúði seg um at marknaðarføra føroyska list á internetinum. Og ein onnur snúði seg um at byggja fjallasmáttur, og var meir at meta sum ein íløga heldur enn marknaðarføring, sigur Unn á Lað, marknaðarleiðari.

Freistin at søkja um at fáa lut í milliónini, sum Ferðaráðið hevur sett av til serlig tiltøk innan marknaðarføring, er í ár 5. februar.



## Atgongumerki til Planet Awards til sølu

**Atgongumerkini til ársins gallaveitslu Planet Awards eru nú komin í handlarnar, men talan er um sera avmarkaðar nøgdir.**

PLANET AWARDS
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Aftur í ár heiðra Planet.fo og Sosialurin føroyskum tónleikalívi. Hetta verður gjørt á stórum gallatiltakið á Hotel Føroyum leygarkvøldið 27. januar. Á tiltakinum vera Planetir handaðar til:

- ***Besta útgávu***
- ***Besta bólk/einstakling***
- ***Besti sangara***
- ***Bestu songkvinnu***
- ***Besta nýggja bólk/einstakling***
- ***Besta útlendska bólk/einstakling***
- ***Serliga planet herðaklappið***

Eisini verður góður tónleikur at hoyra, bæði føroyskur og útlendskur. Á tiltakinum verða tey innstillaðu gestir, her er tilsamans talan um 35 bólkar, og hetta eru nógv fólk. Tí er talið á seldum atgongumerkjum avmarkað til 400. Komandi dagarnar verða luttakandi tónleikanøvn avdúkaði. Men longu nú ber til at tryggja sær atgongd til ársins galla tiltak. Atgongumerki til Planet Awards, ein vælkomudrykk, herligt One Fork Meal og dans aftan á kostar kr.250 og fæst í Telebúðunum í Havn, Runavík, Klaksvík, í Miðlahúsinum í Vágsbotni og á teleshop.fo

Tiltakið hevur 18 ára aldursmark.

# Jens Marni og Høgni í Manhattan

**Hetta vikuskiftið verða nógv láníløg at hoyra í Manhattan, tá tveir av okkara bestu barrsangarum gera um seg í barrini**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fríggjakvøldið fer Jens Marni Hansen at undirhalda í Manhattan, ið fríggjakvøldið leggur pall til seinastu konsertina við Høgna Reistrup í hesum umfarinum.

Høgni Reistrup tvífaldur finalistur í Singer/Songwriter kappingini og oddamaður í Lawetz, í báðum samanhangum hevur Høgni víst seg sum ein framúrskarandi sangskrivara. Men leygarkvøldið verður ikki talan um egin løg.

- Eg fari mest at spæla Bob Dylan og tílíkt, sama program, sum eg og Finnur Jensen plaga at spæla, sigur Høgni.

Høgni hevur spælt rættiliga fitt í Manhattan og á Café Natúr, síðan hann kom til Føroyar í sambandi við jólafrítíðina. Men sunnudagin gongur leiðin aftur til Århus, har hann lesur.

Jens Marni Hansen hevur, síðan hann fyrstu ferð gjørdi vart við seg sum næst stuttligasti maður í Kollafirði og sum gittarleikari í Kjølum, verið oddamaður í All That Rain og ein av nógvum oddamonnum í Showmonnum. Men øll árini hevur Jens Marni verið at hoyrt sum einstaklingur við kassagittaranum. Við ráðu røddini er hann uttan iva Føroya besti Bryan Adams tulkari, og skemtiligur sum fáur.



*Høgna Reistrup*